Brak í Vági

Umframt at vera avgjørdi oddadysturin í bestu kvinnudeildini, er dysturin í Vági eisini eitt slag av forpremieru til steypafinaluna komandi vikuskifti

KVINNUHONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Einki er at ivast í, hvørji eru fremstu liðini í føroyskum kvinnuhondbólti í ár. Hóast aðrir partar eisini hava argað til tíðir, so hava tað fyrst og fremst verið VB og VÍF, sum hava sett kósina, sum hini so mugu royna at fylgja.

Skal nakar parturin takast framum, so má tað verða VB. Í løtuni hava tær leikt ein dyst færri enn VÍF, men hava kortini sama stigatal, og við einum heimasigri um vikuskiftið, kunnu tær veruliga seta seg í førarasetrið, tá veruligi gullsparturin skal setast ígongd.

Í Vági er eisini rættiliga sjáldan, at nakar stendur heimaliðnum kurl. Ikki minst fekk VÍF hetta at kenna, tá tær í fyrra dystinum í grundspælinum vóru fyri greiðum tapi í Vági. Fyrst og fremst hava tað kanska verið útlendsku leikararnir á liðnum, sum hava skotið málini, men hartil tykjast heimligu leikararnir eisini at vera eina tonn betri fyri í ár, enn tær hava verið undanfarnu árini. Ikki minst er munurin sálarligur, soleiðis at liðið í flestu førunum hevur kunnað koppað tøttu dystunum til egnan fyrimun. Ein eginleiki, sum ivaleyst eisini verður tørvur á sunnudagin.

Tí tað er lítið at ivast í, at VÍF kemur suður eftir báðum stigunum. Skulu meistararnir framhaldandi hava møguleikan at avgera alt sjálvar, so er tað snøgt sagt ein fortreyt, at VB ikki vinnur dystin. Og tað kann so eisini leggjast afturat, at VÍF í stóran mun sjálvar gera av, hvussu støðan verður eftir dystin. Fram um hini liðini, so hevur VÍF ivaleyst verið tann parturin, sum hevur sýnt besta spælið í ár, og finna tær toppin í hesum fram, so er neyvan nakar, sum stendur teimum kurl. Hinvegin hava tær ikki eins og VB megnað at sýnt støðugt góð avrik, og tí kann tað eins væl gerast dagurin hjá VB hesaferð.

Og so er tað sum sagt eisini forpremieran til steypafinalurnar. Har skulu liðini hittast aftur um eina viku, og tí kann talan eisini gerast um eina styrkisroynd, við øllum tí, sum har til hoyrir av taktiskum snildum.

Talan verður um satt oddabrak í Vági, tá VÍF kemur á vitjan, og lítil ivi er um, at vinnarin av teirri uppgerðini verður kosin sum stórfavorittur til FM-heitið

Besta boðið upp á bronsumerkjuni tykist í løtuni at vera Stjørnan úr Klaksvík. Og á pappírinum eru tað eisini tær, sum hava bestu fortreytirnar at økja um stigatalið um vikuskiftið. Í Klaksvík kemur eitt kreppurakt Neistalið nevnliga á vitjan, og tó at tær í Klaksvík helst iðra seg um greiða tapið fyri VÍF í hálvfinaluni, so er einki at ivast í, at teir ætla sær stigini ímóti Neistanum, og er hetta nakað, sum liðið undir vanligum umstøðum eigur at megna.

Seinasti dysturin hetta vikuskiftið verður í Havn, har Kyndil og StÍF skulu gera av, hvør teirra í fyrsta umfari skal elta Stjørnuna. Enn eru sjálvandi nógvir dystir eftir at leika, men samstundis gerast ráðini at missa alsamt verri, og tí er hetta ein dystur, sum báðir partar fyri alt í verðini mugu vinna.

Spenningur í Klaksvík

Leygardagin verður toppdystur í Klaksvík millum Mjølnir og ÍF, og nú oddaliðið hevur mist stig, eru kanska útlit fyri einum spennandi dysti

MANSFLOGBÓLTUR
Jákup Mørk

Leingi hevur verið sagt, at ÍF er so nógv betri enn hini liðini, at eingin grund er at droyma um at taka teir aftur.

Men støðan er kortini ikki meira vónleys enn so, at um Mjølnir vinnur á ÍF leygardagin, so er ÍF bert eitt stig frammanfyri Mjølnir.

Og hetta er kanska eisini júst rætta løtan hjá Mjølni at gera tað í. Tí seinasta vikuskifti hendi nevniliga tað, sum ikki er hent fyrr í ár, og sum nógv roknaðu við fór als ikki at henda: at ÍF tapti. Tað gjørdu teir sum kunnugt móti Fram.

Í ÍF valdu teir kortini at siga, at ósigurin seinasta vikuskifti var kanska ikki so galin hóast alt, tí hetta minnir teir á, at tú fært einki føroyameistaraheiti borið upp í hendurnar og skjótt er at missa alt á gólvið. T.d var í fjørð móti endanum av kappingini leingi skrivað, at Fleyr kundið ikki verða tikið, men tá kappingin var liðug, tá stóðu teir so nipnir við ongum steypi. Tað hevði Fram tikið beint frammanfyri nøsini á teimum á seinasta leikdegi.

Einki er at ivast í, at teir í Mjølni fara at gera alt tað teir eru mentir at vinna dystin, tí vinna teir, so er bert eitt stig á muni millum Mjølnir og ÍF, og tá kann jú alt henda.

Men tað skal nógv til at vinna á ÍF, tí ÍF-maskinan er sera vælsmurd í ár. Men sum Páll Guðlaugsson plagdi at siga: "Bólturin er rundur", og tað er flogbóltar eisini...

Fram sett stiman á

Eftir at Fram hevur lagt navn til onkrar av teimum keðiligaru yvirskriftunum seinastu tíðina, blivu hesar skiftar út við meira positivar yvirskriftir í hesari vikuni. Tað var tá Fram, sum tað higartil einasta liðið, megnaði at vinna á ÍF.

Og líkt er til, at teir í Fram hava sett stiman á, tí teir hava nevniliga vunnið allar dystirnar í seinru hálvu (tó mistu teir tann eina sigurin aftur, tí teir høvdu nýtt ein ólóligan leikara).

Men SÍ tykist eisini vera vaknað úr dvala, eftir eina laka fyrru hálvu, men í seinasta dysti formáddu teir sær kortini lítið móti ÍF. Skulu sørvingar hótta Fram sunnudagin, so skal avrikið verða nógv betri enn tá. Við heimavallar fyrimuninum verður tað eisini tað, og tí vænta vit okkum ein góðan og spennandi dyst í Sørvági sunnudagin.

Oddabrak í Klaksvík

Leygardagin verður ein sera avgerandi dystur leiktur í KÍ-høllini millum Mjølnir og ÍF

KVINNUFLOGBÓLTUR
Kunning frá FBF

Sum nú er, liggur ÍF á odda í kappingini, 1 stig frammanfyri Mjølnir á øðrum plássi.

Liðini hava spælt 2 landskappingardystir sínámillum fyrr í ár og vunnið hvør sín, so her er talan um tvey sera jøvn lið, og alt talar tískil fyri einum sera spennandi oddabraki í Klaksvík.

Kortini verður føroyameistaraheitið ikki avgjørt í hesum dystinum. Til tað eru ov nógvir dystir eftir. Men vinnarin av dystinum kemur kortini at liggja best fyri í kappingini, og kann avgera alt sjálvur, uttan at krevja hjálp frá øðrum liðum.

TB enn við í gullstríðnum

Núverandi føroyameistararnir TB hava ein lættan dyst móti Fleyr í Høllini í Trongisvági leygardagin. Hóast framgongd er at hóma hjá Fleyr, so er munurin á hesum báðum liðunum kortini ov stórur, til at Fleyr kann hótta TB stórvegis.

Í løtuni liggur TB nakað aftanfyri hinarbáðar gull aspirantarnar, ÍF og Mjølnir, men enn eru ikki allir møgulleikar foknir hjá TB. Og hetta eru ikki bert matematiskir møguleikar. Kravið er kortini, at TB vinnur allar dystirnar sum eftir eru, 6 í tali, men tað er ikki ógjørligt. Men haraftrat skulu ÍF og Mjølnir vinna hvør sín dyst í teirra innanhýsis dystum (Mjølnir - ÍF og ÍF - Mjølnir). Tá verða TB og ÍF jøvn í stigum á ovasta plássi (um vit ganga út frá at Mjølnir og ÍF eisini vinna allar írestandi dystirnar móti Drátti, Fleyr og KÍF), og so verður tað settmunurin sum verður avgerandi.

Tiskil hevur TB bert ráð at vinna 3-0.

Vinnur annaðhvørt ÍF ella Mjølnir báðar innanhýsis-dystirnar, so verður tað ikki TB sum verður føroyameistari (um ikki ÍF ella Mjølnir missa stig til KÍF, Fleyr ella Drátt), hóast TB vinnur allar dystirnar sum eftir eru.

KÍF - Dráttur

Skal KÍF gera sær vónir um at vinna dystir í meistaradeildini í ár, so skal tað verða í dysti móti teimum niðari støðu liðunum. Og hyggja vit at støðuni, so síggja vit at mótstøðuliðið sunnudagin, Dráttur, við 5 stigum í posanum, er eitt av teimum.

Og KÍF hevur eisini staðið seg væl móti Drátti í ár, hóast teir báðir fyrru dystirnir eru taptir; annar 2-3 og hin 1-3, so vónirnar hjá KÍF eru góðar til dystin.

Hóast Dráttur liggur nakað nær botninum nú, so byrjaði árið hjá Drátti kortini heilt hampuliga, og tær vóru ikki so langt aftanfyri tey 3 oddaliðini, men so fór formkurvan ein ordans rutschutur og rakti á botn beint fyri jól, tá Dráttur á heimavølli tapti fyri Fleyr. Og tað er eisini rættuliga langt síðani at Dráttur hevur vunnið. - Tær hava nevniliga tapt 6 dystir upp í slag. Seinasti sigurin var 8. desember 2002 og hann var júst móti KÍF.

So, skal Dráttur fylla sær meira uppí stigaposan, so er eitt gott høvi kanska sunnudagin.



FM-heitið verður ikki avgjørt, men eitt avgerandi stig kann verða tikið av vinnaranum av dystinum í Klaksvík

VÍF-Stjørnan 29-19 (15-8):

Allur ivi burturbeindur

Sóley Mikkelsen varð at kalla tikin burtur úr spælinum allan dystin, men hóast hon á myndini sær heldur kroyt út, so vóru tað hon og VÍF, sum vóru ománá alla tíðina

Mynd: Álvur Haraldsen

Eftir at hava tapt tepurt í fyrra dystinum, reisti VÍF seg, soleiðis at Stjørnan fekk av at vita, tá tær vitjaðu í Vestmanna

COCA-COLA KAPPINGIN, KVINNUR
Jákup Mørk

Tað tók ikki langa tíð hjá VÍF at prógva, at tapið fyri Stjørnuni í fyrru hálvfinaluni at kalla bert var eitt mistak. Eftir hálvan fyrra hálvleik stóð longu 9-3 á máltalvuni í Vestmanna, og eftir hetta kom at kalla ikki nakað, sum líktist spenningini í aftur dystin.

Mansverjan frígjørdi

Tað tóktist annars greitt, at Stjørnan longu frá byrjan hevði eina ætlan um, hvussu spælið hjá VÍF skuldi bremsast. Fyrst og fremst við at taka Sóley Mikkelsen úr álopspartinum hjá VÍF, og harnæst við at lata egna álopspartin koyra ígjøgnum serstakliga Danijelu Ercevic, sum í flestu av dystunum hjá Stjørnuni hevur verið tann leikarin, sum hevur verið munurin á vágskálini.

Tað vóru tó nøkur minuss við hesi ætlan hjá Stjørnuni. Fyrst og fremst, at VÍF ongan tíð lat seg órógva av, at Sóley ikki fekk verið so nógv við í framrættaða spælinum. Til tíðir minti hetta um venjingarstøður, har leikararnir framman undan hava terpað, hvussu spælast skal undir ávísum fortreytum, og tað man neyvan vera nakað ivi um, at hetta er ein støða, sum VÍF hevur vant nógv.

Rúmdin hjá øðrum leikarum gjørdist sjálvandi størri av hesum. Við at lata Fríðu Marjunardóttur og Nicolinu Eyðbjørnsdóttir toyggja vongspælið mest sum út á síðulinjuna, gjørdist sera rúmsátt hjá bakkunum báðum, og her sýndu bæði Nicoleta Radu og Jacklin Durhuus, at tær framvegis teljast millum vandamestu leikararnar í føroyskum kvinnuhondbólti. Væl hjálptar av eini konstant screenandi Alis Høghamar í strikuni.

Eitt var, at hesin parturin av spælinum miseydnaðist, men heldur ikki í álopspartinum gekst nakað serligt. Eina mest tí tað at kalla bert var Danijela, sum megnaði at senda bóltin framvið VÍF málverjanum. Tey tap, sum VÍF hevur havt í ár, eru mest sum øll komin, tá vengirnir hjá mótstøðuliðnum hava havt ein somikið góðan dag, at tað hevur eydnast at skora hjá Manuelu Stan. Tað megnaðu vongspælararnir hjá Stjørnuni ongan tíð í nóg stóran mun, og tá tú hevur slíkan málverja, er einki at taka seg aftur í, at tað er mundi lættari at hava eina tætta verju, sum ikki loyvir gjøgnumbrotum frá einstaklingum á mótstøðuliðnum. Burtur sæð frá leikandi venjanarum vóru innspælingarnar til Unu Olsen á strikuni stórt sæð einasta álopsvápnið, og í longdini var hetta alt ov lítið.

Uppvísing

Við greiðu leiðsluni í hálvleikinum, mundu flestu vestmenningar longu vera farnir undir at fyrireika ferðina til Havnar komandi vikuskifti, men tey fingu ein lítlan hvøkk beint eftir steðgin. Trý gestamál á rað mundu spakuliga fáa tankarnar at leita eitt samdøgur aftureftir, men tað var tó skjótt, at hesin seinasti ivin eisini varð beindur av vegnum. Ferðin á verjuspælinum varð aftur sett upp, soleiðis at kontra spælið fekst at koyra, og so kundu gestirnir illa gera annað enn at hyggja og læra.

Við millimetur-neyvu køstunum frá Manuelu sum kruntappinum í hesum partinum av spælinum, sluppu VÍF leikarar ferð eftir ferð antin leysar ella komu í yvirtalsstøður í kontrafasuni, og tað mundi í roynd og veru bert vera eini væl leikandi Agné Masenaite at takka, at tapið hjá Stjørnuni ikki gjørdist enn greiðari, enn endaliga støðan sigur.

Við sigrinum syrgdu VÍF fyri, at tær triðja árið á rað - og fjórðu ferð í fimm ár hava bílagt sær atgongumerki til steypafinaluna, og bara tað í sjálvum sær ber greið boð um makstøðuna, sum liðið hevur í føroyskum hondbólti. Verður spælið í finaludystinum á sama støði, er heldur einki at ivast í, at VÍF hevur allar fortreytir fyri at vinna dystin. Hinvegin hevur óstabilitetur eisini í ávísan mun eyðkent liðið í ár, og er tað nakað, sum liðið ikki hevur ráð til júst nú, so eru tað akkúrat óstøðug avrik. Men endaliga svarið til tann spurningin má so bíða í enn eina viku.

Dysturin í tølum

VÍF-Stjørnan 29-19 (15-8)

VÍF í finaluna við samanlagt 46-37

Málskjúttar:

VÍF: Nicoleta Radu 9, Jacklin Durhuus 6, Sóley Mikkelsen 4(3), Nicolina Eyðbjørnsdóttir 4, Fríða Marjunardóttir 2, Alis Høghamar 2, Hertha Simonsen 1, Sára Jógvansdóttir 1

Stjørnan: Danijela Ercevic 10(5), Natasha Stamenkovic 3, Una Olsen 3, Davina Sundskarð 1, Bára S. Klakstein 1, Jastrid Gullaksen 1

Brotskøst: VÍF 4, Stjørnan 6

Útvísingar: VÍF 2, Stjørnan 3

Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Eyðun Samuelsen. Høvdu allatíðina tamarhald á, uttan at hava tørv á teimum stóru armsveiggjunum.

Miðsavnan

Eins og hjá kvinnunum, so verður talan um forpremieru upp á steypafinaluna hetta vikuskiftið, tá tríggir hondbóltsdystir verða leiktir í høvuðsstaðnum

MANSHONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Kyndil og StÍF hava leikt seg í steypafinaluna í føroyskum manshondbólti, og júst hesi bæði liðini hittast í Havn, nú bert ein vika er eftir, til sjálvir finaludystirnir eru á skránni.

Tá tosað verður um steypafinalur, verður oftast sagt, at alt er púrasta opið í útgangsstøðinum, men tó at nógv enn er opið, og nógvir spurningar eru ósvaraðir, so má StÍF kortini metast sum favorittur sunnudagin. Fyrst og fremst tí liðið hevur staðið seg betri í landskappingini. Tvey av teimum trimum tapunum hjá liðnum hava verið í Havn, men hóast hetta, so tykist vera væl betri fyri enn Kyndil, sum ongan tíð hevur fingið rættiliga ferð á. At talan so er um eina heilt aðra uppgerð um eina viku, er nakað annað, men hesa ferð má StÍF metast sum favorittur.

Tað eru VÍF og Neistin eisini, tá tey vitja í Hoyvíkarhøllini ávíkavist Leygar- og sunnudagin. Her eigur VÍF fyrsta tørnið, tá teir vitja hjá H71 leygardagin. Enn hongur vónbrotið um mista finalusessin ivaleyst á vestmenningum, og enn eru vestmenningarnir ikki fullmannaðir, men skal metast eftir pappírinum, so er eingin ivi um, at liðið eru stórfavorittar ímóti H71. Eisini hóast H71 vann á Neistanum seinasta vikuskiftið.

Júst tað úrslitið ger eisini, at tað kanska er eitt sindur ivasamt við favoritt-leiklutinum hjá Neistanum sunnudagin. Var talan bara um eina undirmetan av hoyvíkingum ella ein kollektivan off-day. Ella var hetta úrslitið bara eitt tekin um, at Neistin kanska ikki er so nógv betri, enn mett varð undan kappingarárinum, og at liðið bara hevur fingið meira enn maksimalt burturúr grundspælinum?

Tað líkist av álvara eini sannari styrkisroynd hjá Neistanum, men tað ger tað hinvegin eisini hjá KÍF. Seinnu helvt av grundspælinum tóktist liðið í øllum førum fleiri ferðir at vilja hótta tradítionelt stóru liðini, og møguleikin er nú nærri enn nakrantíð.

Vinnur KÍF dystin sunnudagin, eru teir nevnliga ájavnir Neistanum, swo allar fortreytir fyri einum spennandi og intensum dysti tykjast vera til staðar.